# Frælsiskyndil sløknaður

# Páll Poulsen

## 1936 - 2003



Nú eg siti her, oman á rossafjósunum hjá hennara hátign Margrethu og hennara franska prinsi, uttast á sokallaða Ríðibananum, sum er ein partur av Christians-borgar slátri, rennur eitt drúgt og oftani ókyrt lív fram fyri meg. Serliga í politiskum samanhangi. Eitt tríati ára skeið, sum partur av politiskum flokki í samstarvi við fólk við felags áhuga og hugsjónum, er ikki hissini barlast, - kjalarfest í sálarinnar dýpum. So dragandi og ávirkandi, at oftani kennist tað sum lív og menniskju og politikkur renna saman í eitt.

Páll Poulsen í Syðrugøtu - Páll hjá Andriasi í Útiguttastovu - var ein av teimum sum var við á hesi lívsjáttandi ferð. Ferðini fram ímóti føroysku republikkini. Nú er hann sløknaður, hamurin lagdur í mold yviri á Breiðastykki og sálin setst við føtur hansara, sum øllum valdar. Treysti andi hansara og bjarta lívssjónin liva eftir og kunna frameftir bara vera okkum øðrum til leiðbeiningar og fyrimyndar.

Páll varð føddur í Syðrugøtu hin 29. desember 1936. Foreldrini vóru Andrias og Jóhanna Maria av Skansanum, harvið var hann fullblóðs gøtumaður. Eyðsýniliga hevur hann verið uppkallaður eftir abbanum, Poul Kristoffuri, sum gekk burtur á útróðri, suður úr Borðoyarnesi, í 1944. Foreldrini giftust í fyrsta lagi inn í Útiguttastovu, eitt skifti búðu tey úti í Grógv, í gomlu húsunum, ið stóðu á grundini harið húsini hjá Osbjørn hjá Óla Hans nú standa. Og seinri fluttu tey yvir undir Eiði at búgva. Tá mundi Páll vera um tíggju ára aldur. Hann gekk í skúla yviri við Gjógv og í Søldarfirði. Og eftir lokna skúlagongd var hann til skips í nøkur ár, soleiðis sum flestu ungdómar komu sær til mans tá á døgum. Vit vóru næstu skyldmenn, mamma og Páll vóru systkinabørn, og tað merktist, at hann var ein sera ættkærur maður. Mína vegna kendist hetta ikki minst í politiska turbulensinum, harið væmingar og vaggandi gjálv so tíðum eru uppi, og um okkara viðurskifti kann bara staðfestast: At onki er tað blóð, sum ikki er tjúkkari enn vatn.

Poul Kristoffur var framburðsmaður. Keypti ein av fyrstu bilunum í oynni, og átók sær ábyrgdina av postflutninginum í økinum. Í so máta var hann sjálvstøðugur vinnurekandi við samstarvsavtalu við táverandi danska postverkið. Og somikið av áliti man hava verið í, at samstarvið gekk í arv. Andrias tók yvir tá ið pápin var farin, og tá ið hann ikki helt seg til longur, átók Páll sær ábyrgdina av postflutninginum í einum stórum parti av Eysturoy. Teir hjá Andriasi eru serliga kendir fyri at vera fimir í handfaringini av maskinamboðum, broytum o.ø. og Páll var onki undantak í so máta. Eitt skifti starvaðist hann í slíkum ørindum í Suðuroy, tá ið vegurin til nýggju kolanámini í Hvalba varð gjørdur. Eitt annað skiftið í Mjørkadali, tá ið vesturlendska hernaðaralliansan var farin at byggja sær reiður á føroyskum fjøllum. Men arvurin dró. Postflutningur gjørdist hansara høvuðsverk. Nakað eftir at Postverk Føroya varð stovnað, var virksemið hjá trimum ættarliðum í Útiguttastovu, í góðari semju lagt undir stovnin, og sjálvandi varð Páll ein partur av sínum egna viðføri, og virkaði hjá hesum landsstovni haðartil hann mettur av døgum sovnaði inn í deyðan hin 21. januar í ár.

Páll leitaði sær út á Toftir eftir maka. Margit Heinesen. Úr Hoygarðinum. Og tað er ikki ov nógv sagt, at fá kona man hava staðið einum manni so dygg undir lið sum Margit. Sást annað, so sóust bæði. Tað svitaðist næstan ikki. Rákin av einum sjaldsama væl samansjóðaðum felagsstevi, tvívegis góðsku og mergjaðum áliti, var fyllingin, tá ið tey bæði vóru í nánd. Somikið tyngri man saknurin vera hjá tær Margit og tykkum báðum børnunum, Andriasi og Conny.

Páll og Margit giftust inn undir Gøtueiði. Seinri komu tey yvir aftur um Eiði at búgva. Leigaðu fyrst húsini hjá lokala skaldinum, Einari Tróndargjógv, og nakað eftir hetta keyptu tey húsini. Páll var aftur á fornum slóðum. Búði nú aftur ímillum áirnar í Syðrugøtu. Har sum forfedrar hansara høvdu búleikast í øldir. Hann var ein sera virkin og hugaður maður. Røktaði fyri uttan Hús, - í ognarhaganum. Hevði gerði. Velti og hoyggjaði. Fekst við seyðahald. Var áhugaður í ítrótti og í so máta munna mangir kenna hann frá talvborðinum, serliga tey árini táið Gøtu Talvfelag var ímillum tey fremstu í landinum. Hann var í nógv ár á úrvalsliðnum hjá gøtumonnum. Og har vóru fleiri góðir telvarar í streytinum, sum dámdu og dyrkaðu hendan fremjandi heilafimleik. Eldsálir. Lívgevarar. Guvan av andsevnum stóð upp um húsatromirnar. Petur Eli, Pól, Martin í Grund, Ólavur o.s.fr. Valforvaraðir menn handan skallabeinini.

Páll merkti tíðligani ellisbrek. Sjúkur herjaðu hann. Sukursjúku fekk hann í bestu árum. Og hann var ikki meiri enn gott og væl hálvthundrað ára gamal tá ið ríður av blóðtøppum meiddu hann somikið, at ein partur av arbeiðsførinum dragnaði. Tá ið læknarnir hildu standin vera so ringan, at hann átti at gevast við postflutninginum, vóru teir so large á postverkinum, at teir skipaðu honum eitt starv, soleiðis at hann kundi sita har heimi, ímillum áirnar í Syðrugøtu, og virka fyri frímerkjadeild stovnsins. Hugaligur, skilagóður og virkin starvsfólkapolitikkur, harið menniskju darvað og meint rakt av sjúku, og annars andsfrísk og ferug, kunna hava ein meiningsfullan dag at fara upp til. Í heyst søkti ein so hervilig sjúka at honum, at hann bar ikki boðini. Avmálda tíðin var komin. Deyðin gjørdi bart. Páll var tikin úr hesum heimi. Foldarlívið endað.

Páll var áhugaður í samfelagsmálum og politikki. Var loysingarmaður um ein háls. Her var eingin slingur í valsinum. Og soleiðis var tað ongantíð nakar ivi í hansara sál um, at Tjóðveldisflokkurin var einasta poltiska høpið í landinum, ið kundi verja hansara áhugamál, og einasti broddur, ið var nóg treystur at søkja at avgerðandi málinum hjá einhvørji tjóð. Fulla politiska frælsinum. Fullveldinum. Republikkini.

Minnist, at hann var á limafundi í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, hugsi tað var á Muntra í Fuglafirði, tá ið undirritaði, sum lítið meiri enn avnalvaður ungdómur, miðskeiðis í sjeytiárunum, lat meg skráseta sum lim í hesum treysta felag. Síðani hava okkara leiðir verið tvinnaðar saman meiri og minni. Hann var nevndarlimur í fleiri ár, frá 1980-1989. Hetta seinasta árið sum formaður. Soleiðis komu vit at sita í nevndini saman í fleiri ár, og tað sum eyðkendi Páll, var at hann altíð siktaði eftir teimum yvirskipaðu málunum. Orkaði ikki hetta lítið stimbrandi persónsstríðið, sum oftani tekur seg upp í slíkum felagsskapum. Við sínum serstakliga ljósa, sakliga og positiva lyndi, var tað oftani hann sum fekk gonguna á glið aftur. Var tað, sum teir aðrastaðir kalla hin gráa eminansan, kjølfestan. Sum megnaði at fáa oftani eksplosivu gemyttini at semjast og skilja álvaran. Ein av teimum tungu dreingjunum í oyggjafelagnum. Lívsnerva floksins í Eysturoy. Sjálvur hevði hann ongar ambitiónir um at gerast aktivur politikari, tað var sakin tað galt, men harfyri stillaði hann upp til løgtingsval í tveimum umførum, mest fyri at hjálpa flokkinum til so dygga undirtøku sum gjørligt. Hugsi hetta var í 74 og í 78. Tá ið Páll valdi at fara úr nevnd felagsins í 89 kom kona hansara Margit inn í nevndina ístaðin, og soleiðis høvdu tey eisini felags stev í samfelags- & politiskum viðurskiftum.

Var tað ikki fyri Páll, so sat undirritaði neyvan í danska høvuðsstaðnum í kvøld og skrivaði hesi fátæku minningarorðini um ein falnan skyldmann, vin og dyggan stuðul. Royndi sum frægast á løgtingsvalinum í 84. Tað munaði sjálvandi lítið ímóti so frægum kempum sum Peturi Reinert og Signari Hansen. Vinnulig gerðamál og sjólívið er lítið sambærligt við eitt aktivt politiskt lív. Harvið varð tað. Men harfyri var áhugin hin sami fyri samfelagsmálum og politiskum viðurskiftum. Hugsjónin óvikandi. Og ein dagin, tíðligani í 1998, ringir Páll og sigur mær at tjóðveldismenninir í Gøtu høvdu ilt við at finna eitt valevni til løgtingsvalið. Um tað var nakar tjansur fyri, at eg kundi átaka mær hendan leiklutin? Míni barnaár og uppvøkstur og kærleiki til hesa bygdina mundi vera orsøkin til, at teir vóru komnir framá hesa møguligu loysnina. Dró á bæði. Hevði ríkiligt av øðrum at taka mær fyri. Bað um eina umhugsunartíð. Og ímeðan eg lá undir sveiggjandi pálmunum vesturi í Havanna hetta várið, ivaleyst eggjaður av tropiska varmanum, flógva karibiska lotinum og kubansku kollveltingini, avgjørdi eg at taka av tilboðnum frá gøtumonnum. Varpaði eitt skriv heim til felagið, og setti sum einastu treyt fyri uppstillingini, at skyldmaðurin Páll Poulsen skuldi vera mín stillari. Og so varð. Tí siti eg hetta kalda vetrarkvøldið, á Danmarkar frostsprongdu fløtum, og skrivi tær hesa seinastu heilsanina. Hvíl í friði kæri frændi. Um teg eru bara góð minnir. Royktámið frá sorgini hvørvur fyri eygum tykkara, ið eftir sita, og minni um góðan mann verður standandi hjá konu, børnum, abbabørnum og øllum okkum sum vóru so heppin, at vit komu at kenna Páll hjá Andriasi í Útiguttastovu.

**Tórbjørn**







Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir barrvørðum (m/k) til Kobarbarrina og Lobbybarrina at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til yvirtænaran. Starvið umfatar ma.:

- Eina professionella kundatænastu
- Skeinkjan av sterkum drykkjum
- Skipa virksemi í barrunum
- Aðrar viðkomandi uppgávur

**Umsøkjarin**
- Er álítandi og fyrikomandi
- Er smílandi og løtt/lættur av lyndi
- Hevur góð samstarvsevni
- Kann veit eina góða og skjóta tænastu

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Petur Hentze á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2003

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir fólki til móttøkuna at byrja 1. mei 2003.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til móttøkuleiðaran. Starvið umfatar ma.: Eina professionella kundatænastu, inn- og útskriving av gestum, telefonavgreiðsla, bíleggingar, søla av kioskvørum og aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
- Er smílandi og fyrikomandi
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur kunnleika til enskt og KT

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Avbjóðingar á altjóða støði
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Unn Hilduberg, móttøkuleiðari á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2003

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870

LG FØROYA BESTA VASKIMASKINA



- **7 ára garanti**
- 7 kg trumla
- Digital stýring
- Skerm ið vísir resttíð
- Stillfør
- Stórt lúkuop

damor
Kvíggjartún 3 • Argir • Tel. 315415 • Fax 319001

**Ford Escort Sport**



árg. 1995, til sølu fyri 62.000 kr. Koyrt 78.000 km. Nýggjar bremsur og stoytdoyvarar + »kilerem«. Er í góðum standi.

**Tlf. 264640**

**Barna- og ungdóms-talvkapping fyri lið!**

**Kappingarnar verða skipaðar sum liðkappingar.**
**4 luttakarar á hvørjum liði.**
**Bólkarnir verða tveir:**
**upp til 4. flokk og 5. flokkur og eldri.**

**Heiðursmerki verða givin til 3 tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki.**
**Ókeypis matur í steðginum.**

**1. Á Giljanesi leygardagin 1. mars 2003 klokkan 12.00**

**Seinasta freist fyri tuttøku er mikudagin 26. februar**

**Tilmelding: Torkild Nielsen - tlf. 333 522**
**fartlf. 227 207 - fax. 332 701**
**Jóannes S. Ellefsen - tlf. 333 164 - 333 182**
**fartlf. 251 874 - fax. 333 689**

**Gevið gætur: 2. og 3. kapping vera ávikavist á Oyrarbakka leygardagin 8. og í Havn 24. mars 2003**

**Talvsamband Føroya**

LANDSVERKFRØÐINGURI

**Handverkari**

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi handverkara (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum hjá stovninum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava handverkaraútbúgving sum maskinsmiður ella bilmekanikari.

**Lønarviðurskifti**
Lønin verður sambært sáttmálanum millum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsøkjarar kunnu ringja til Maskinmiðstøðina í Kollafirði tlf. 422420 og tosa við Niels Juul Kristiansen Smiðjuformann.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!